# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Innlendismálaráðið umskipast

Sum ein og hvør organisatión, so eigur landsumsitingin at verða leypandi endurskoðað. Okkara miðfyrisiting var gjørd eftir tí heldur ivasama Norman Christensen leistinum, og tað er tíð uppá at endurskoða henda bygnað, eins og ein og hvør bygnaður og tess skipanir eiga at verða endurskoðaðar av og á, samstundis sum tíðirnar broytast.

Okkara miðfyrisiting er ógvuliga centraliserað, tá tað kemur til millimeturstýring av almennum stovnum, og tá tað kemur til eina stirvna og ótíðarhóskandi játtanarskipan. Hinvegin er miðfyrisitingin ikki centraliserað, har hon burdi verið centraliserað, fyri at fingið fakkunnleikan á eitt hægri støði.

Innlendismálaráðið varð sett á stovn fyri fáum árum síðani, og ikki kann sigast, at hetta ráð hevur riggað væl. Ivasomu málini hava verið fleiri, og seinast hevur ráðið gjørt seg bemerkt í Vestergaard málinum, har tað tykist sum um, at serfrøðin í Innlendismálaráðnum skeldast við serfrøðina í Figgjarmálaráðnum. Hettta er ikki fyrstu ferð, at stýri skeldast alment. Skattgjaldarin situr ferð eftir ferð og hyggir at, tá juristar í einum stýri fyri somu rokning skeldast við juristar í einum øðrum stýri. Hetta er margháttligt pengaspill og vísir, at umsitingin tørvar eina centraliseraða lógardeild. Ikki eitt stýri, har man bara broytir navnið til at vera stýrið hjá landstýismanninum í lógarmálum, men eina veruliga lógardeild, sum veitir løgfrøðiliga ráðgeving til øll stýri.

Ein slík lógardeild burdi verið skipað við teimum bestu løgfrøðingunum, ið umsitingin hevur til taks, við hondplukkaðum juristum úr fleiri stýrum.

Í Føroyum búgva knapt 50.000 fólk. Tað burdi verið lag á manni at skipa eina centrala lógardeild, so vit sluppu frá hesum marghháttliga leiki, har stýri liggja og klandrast alment, tí at juristarnir í umsitingini í einum og sama landsstýri ikki kunnu semjast um, hvat er juridiskt rætt. Sjálvandi vilja tað altíð vera mál, har jursitar eru ósamdir, men borgarin má kunna krevja eina støðu frá Føroya Landsstýri og ikki líka nógvar støður, sum tað eru stýri. Eru ósemjur, so loysir man tær innanveggja, og kemur til eina niðurstøðu, sum borgarin kann fyrihalda seg til.

Okkara ráð eru at umskipa Innlendismálaráðið og gera eina centrala lógardeild, so Føroya Landsstýri kann hava eina juridiska støðu til mál, og ikki fleiri, sum vit tíverri alt ov ofta síggja.

**Sosialurin**

## Bíblian innblást av Gudi (2. partur) ikki mannaorð um Gud

RICHARD DANIELSEN



**Fara vit til ættarfaðirin Ísak, son Ábraham, sum eg endaði 1. part við, so síggja vit tað sama, Harrin talar til Ísak. Hygg her, 1. mósebók 26,1-5**

Hungursneyð kom nú í landinum - sum hina ferðina, á døgum Ábrahams; tá fór Ísakur til filistarakongin Abimelek í Gerar.

2
Men HARRIN opinberaðist fyri honum og segði: "Far ikki til Egyptalands, verð verandi í landinum, sum Eg sigi tær!

3
Búgv sum fremmandur her í landinum, so skal Eg vera við tær og signa teg! Tí tær og avkomi tínum gevi Eg øll hesi lond; Eg skal halda eiðin, ið Eg svór Ábrahami, faðir tínum.

4
Eg skal gera avkom títt sum stjørnurnar á himli í tali og geva avkomi tínum øll hesi lond, og í avkomi tínum skulu øll fólk á jørðini verða signað

5
- aftur fyri at Ábraham lurtaði eftir Mær og helt alt tað, ið Eg álegði honum at halda, boð, fyriskipanir og lógir Mínar."

Sært tú, her fær Ísakur sama lyfti, sum pápi hansara hevði fingið, hetta at teir skuldu fáa hesi lond, sum teir búðu í sum fremmandir. Men tað er ikki alt, nei so kemur hetta lyftið:"Í avkomi tínum skulu øll fólk á jørðini verða signað.

Jákup fær sama lyftið í 28. kap. 12-14. vers:

Tá hevði hann dreym. Hann sá stiga standa á jørðini; ovari endi á honum kom upp til Himmals, og einglar Guds gingu upp og niður gjøgnum hann.

13
Og HARRIN stóð framman fyri hann og segði: "Eg eri HARRIN, Gud Ábrahams, faðirs tíns, og Gud Ísaks; landið, ið tú nú liggur í, tað gevi Eg tær og avkomi tínum.

14
Avkom títt skal verða sum dustið á jørðini, og tú skalt breiða teg vestureftir og eystureftir, norðureftir og suðureftir; og í tær og í avkomi tínum skulu allar ættir á jørðini verða signaðar.

15
Eg skal vera við tær og varðveita teg, hvar tú so fert, og Eg skal føra teg aftur til hetta land; Eg skal ikki fara frá tær, fyrrenn Eg havi gjørt tað, ið Eg havi lovað tær."

16
Her er ikki talan um filosofi. Nei, nei Gud talar beinleiðis til trý ættarlið við opinbering um framtíð teirra, og vit skulu leggja serliga til merkis, lyftið um avkomið. Ábraham fær enntá lyftið tríggjar ferðir, og taka vit kap. 22,18 verður lyftið sagt júst við somu orðum, sum Ísakur og Jákup fingu tað, nevniliga: " Í avkomi tínum skulu allar slektir á jørðini verða signaðar." Paulus ápostul tekur hetta upp í galatiabrævinum, har hann sigur: "Ikki stendur "avkomum", sum um nógvar, men sum um ein:"Og avkomi tínum"- og tað er Kristus."

Eisini Pætur ápostul nevnir hetta á hvítusunnu. Ápostlasøgan 3,25-26.

Tit eru synir profetanna og synir sáttmálans, ið Gud gjørdi við fedrar okkara, táið Hann segði við Ábraham: "Í avkomi tínum skulu allar ættir á jørðini verða signaðar."

Til tykkara fyrst sendi Gud tænara Sín, táið Hann reisti Hann upp, at signa tykkum, táið ein og hvør tykkara vendir við frá illverkum sínum."

Jú vissuliga, bíblian hongur øll saman, og hon handlar um Jesus Kristus, Hetta sigur Jesus eisini sjálvur, tá ið hann fylgdist við tveimum lærisveinum á veg til Emaus eftir uppreisnina.

So mín lesari, lat ongan hvørki leikan ella lærdan villeiða teg hesum viðvíkjandi. Bíblian er øll innblást og boðskapur Guds til okkara.

Í triðja parti skulu vit hyggja eitt sindur uppá hin stóra gudsmannin Móses.

## Miðflokkaveljarar og ræstkjøtaveitsla

EYÐUN Á BORG



**(Yvirskriftin er málslig, ikki politisk ella matlig).**

MIÐFLOKKAVELJARAR (Miðfloksveljarar): Útvørpini tosaðu um miðflokkaveljarar. Tað er ikki rætt í hesum førinum. Her er talan um ein miðflokk, og tí eitur tað miðfloksveljarar (hvørsfall eintal). Sigur nakar fólkaflokkaveljarar?

RÆSTKJØTAVEITSLA (Ræstkjøtsveitsla): Ræstkjøtaveitsla verður sagt og skrivað. Ikki rætt. Kjøt kann ikki setast í fleirtal. Tí mugu vit siga og skriva ræstkjøtsveitsla.

STADIGVEKK TVIVL UM VALGIÐ: Soleiðis varð sagt í onkrum útvarpi. Er danskt føroyskt? Er alt loyvt? Neyvan gagnligt!?!

"Framvegis ivi um valið" er føroyskt.

KVART ÁRHUNDRAÐ: Soleiðis skrivaði føroyskt blað. "Fjórðingsøld" er føroyskt.

Á Borg á sveinsdegi í jólaføstu 2007

***Við málkvøðu***
***Eyðun á Borg***

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Niels Uni Dam nielsuni@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.